# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Johanna Mortensen, fødd Guttesen, vanliga nevnd Ingibjørg, ættað úr Bø, búsitandi í Hvidovre**, andaðist leygardagin 92 ára gomul. Jarðarferðin verður fríggjadagin 5. marts kl. 12.00 úr Avedøre Kirke til føroyska kirkjugarðin á Vestre Kirkegård. Tey, ið vilja minnast Ingibjørg við blómum ella kransi, kunnu ístaðin lata Bíggjar kirkju eina peningagávu, konta í føroysku peningastovnunum.

**Kristin Thomsen, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum í morgun, 68 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kistan við **Terja Nielsen** fer úr kapellinum á Tvøroyrar Sjúkrahúsi týskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður úr Bethel í Vági mikudagin klokkan 12 í kirkjugarðin á Leiti. Tey, ið vilja minnast Terja, kunnu lata Betania í Sumba eina gávu, konta í Suðuroyar Sparikassa.

**Jóhanna Lind Pállson, Borgarnes Ísland**, ættað úr Svínoy, andaðist sunnudagin, 93 ára gomul.

**Peter Kjeldgaard Sandoy**, sonur Bergljót Sandoy, andaðist mikudagin 24. februar, 39 ára gamal. Jarðarferðin verður hósdagin 4. mars kl. 14.30 úr Budolfi kirkju í Ålborg. Tey, ið vilja minnast Petur, kunnu lata eina peningagávu á konto í Føroya banka.

†

Sagt verður frá, at kæra mamma, omma og langomma okkara

**Jóhanna Lind Pállson**
ættað úr Svínoy
búsitandi í Borgarnesi í Íslandi

andaðist sunnudagin 28. februar, 93 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Borgarnesar kirkju leygardagin 6. mars kl. 14.00.

**Sóley**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaða kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Kristin Thomsen**
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánamorgunin 1. mars, 68 ára gomul.
Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum mikukvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Andrass**
**Lydia Maria, Hjørdis, Arnóra og Jóna Kristin**

# Frá Louis Poulsen til Lemvigh-Müller


*Inga Hansen, starvsfólk, og Christian P. Christensen, stjóri í Lemvigh-Müller*

Móttøka var hjá Lemvigh-Müller í R.C.Effersøesgøtu í Havn fríggjadagin 26. februar í sambandi við at 25 ár eru liðin síðan heilsølufyritøkan lat upp í Føroyum. Umleið 50 fólk komu til móttøkuna, tey flestu frá el-innleggjarafyritøkum kring landið.

Tað var upprunaliga danska el-fyritøkan Louis Poulsen, sum lat upp deildina í Føroyum í 1985.

Í 1989 keypti Louis Poulsen heilsølubygningin hjá Kartna Winther við Staravegin. Tá arbeiddu umleið 10 fólk í fyritøkuni. Men tá fíggjarkreppan kom fyrst í 90-unum, varð bygningurin við Staravegin seldur, og flutt varð oman aftur í R.C. Effersøesgøtu.

Í 2007 var el-tekniska deildin hjá Louis Poulsen løgd saman við donsku heilsølufyritøkuni Lemvigh Müller, og deildin í Føroyum skifti navn til Lemvigh-Müller. Louis Poulsen og Lemvigh-Müller eru tvær gamlar fyritøkur, sum báðar vórðu stovnaðar í 1800-talinum.

Stjórin í føroysku deildini hjá Lemvigh-Müller er dan-in Christian P. Christensen, sum hevur búð í Føroyum síðan 1984. Eftir at hava arbeitt hjá Louis Poulsen í Danmark í seks ár fekk hann starv hjá elfyritøkuni Leif Mohr í Havn 1. oktober 1984. Síðan januar 1986 hevur hann verið stjóri í deildini í Føroyum, sum í 2007 skifti navn frá Louis Poulsen til Lemvigh-Müller.



*Umleið 50 fólk vóru til móttøkuna fríggjadagin, tey flestu frá el-innleggjarafyritøkum kring landið*

## Merkisdagar

**60 ár**
Fríggjadagin 5. mars verður Anna Sjúrðardóttir, Hvalvík, 60 ár. Dagurin verður hildin á Hvalvíksvegi 64 frá kl. 18.

**75 ár**
Fríggjadagin 5. mars verður Erling Joensen við Gjógv 75 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.

**Prógv**
Við Sunhedsvidenskabeligt Fakultet, á Aarhus Universitet, tók Hrønn Thorn Rasmussen, ætta úr Sørvági, prógv sum Master of Public Health tann 22. januar 2010

**Brúdleyp**
Páskadag 4. apríl giftast í Thyregod Kirke Súsanna Joensen frá Svínoy og Kim Gotsæd. Tey ið ynskja at gleða okkum við at koma í brúðleyp, biðast vinarliga siga frá á tlf: 0045 26535429 áðrenn manadagin 15. mars.

**Brúdleyp**
Leygardagin 24. apríl giftast Joan Simonsen, Saltangará og Rúni Jallson Niclassen, Skáli. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 14. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða Brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg innan 10. apríl á tlf. 262713, 448051 (Joan) ella 256043, 441603 (Rúni).

## Dagurin

2. mars. Simplicius, deyður ár 483. Hann var pávi frá 468.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*